Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Erling Eidesgaard, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Langtíðarárin av verkfallinum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum

Spurningar:
1. Kann landsstýriskvinnan upplýsa, hvørji langtíðarárin verkfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum hevur á sjúkrahúsverkið?
2. Fyri hvønn dag, ið gongur, har sjúkrarøktarfrøðingarnir framhaldandi eru í verkfalli við verandi, lóggivnu, undantøkum, við hvussu nógvum døgum leingjast ymsu bíðilistarnir til skurðviðgerðir, útgreinað á ymsu skurðviðgerðirnar?
3. Hevur landsstýriskvinnan tryggjað sær, at lív og heilsa ikki kemur í vága orsakað av langtíðarárinum av verkfallinum?

Viðmerkingar:
Sjúkrarøktarfrøðingarnir eru, umvegis undantøk, lóggivnir aftur til arbeiðis. Undantøkini eru ætlað at tryggja, at bráðfeingis (akutt) virksemi ikki liggur lamið, so at lív og heilsa ikki er í vága. Hinvegin liggur alt annað virksemi, sum ikki er bráðfeingis (akutt), nú lamið á skjótt sættu viku. Árinini á annað virksemi av hesum eru ikki serliga sjónlig í verandi løtu, og fokus tykist als ikki vera á tann trupulleikan.

Mær vitandi verða eitt nú skurðviðgerðir, ið ikki eru akuttar, t.d. ortopediskar skurðviðgerðir, eygnaskurðviðgerðir o.a., ikki framdar í løtuni, orsakað av at sjúkrarøktarfrøðingar eru í verkfalli. Skurðviðgerðir, og aðrar viðgerðir við, verða sostatt útsettar, og bíðilistarnir leingjast.

Á Løgtingi, 9. november 2023

Erling Eidesgaard